# Áheitan til Eyðgunn og Aksel at verja tunnilin norður um fjall

Fitt av fólki møtti til aðalfundin hjá Noroya Javnaðarfelag. Tveir nevndarlimir stóðu fyri valið og vóru Eyðgunn Samuelsen og Søren Olsen vald í nevndina, Søren Olsen er nývaldur. Á fundinum luttóku Hans Pauli Strøm landstýrismaður, Eyðgunn Samuelsen, Andrias Petersen og Aksel Johannesen, ið júst nú hevur sætið á tingið. Jákup Mikkelsen býráðslimur luttók eisini á fundinum. Fundurin átalaði tað niðurraðfesting, ið nýggja býráðssamgongan fremur innan sosiala øki og heitti á býráðsumboðini um framhaldandi at verja sosiala øki, bæði í býráðsumsitingini og býnum annars. Politiska støðan, hvørji mál samgongan ætlar at fremja í hesi tingsetuni og íløguætlanin hjá landinum vóru eisini viðgjørd. Fundurin samtykti einmælt at Tunnilin Norð um Fjall skal ikki nertast. Nevndin er nú hendan Signhild Joensen, Tummas Lervig, Eyðgunn Samuelsen, Dora Joensen, Sørin Olsen, nývaldur. Nevndin skipar seg seinni í vikuni.



# Bowling bilar og buffet



*Berg Vatnhamar, leiðari, Eyðvør Vatnhamar Olsen, køksleiðari, og Ólavur Olsen, eigari av Bowlinghøllini í Leirvík*

**Síðani miðan november hevur Bowlinghøllin í Leirvík bjóða viðskiftafólki eina nýmótans matstovu at njóta ein góðan bita í eftir – ella undan – einum bowlingtúri í Leirvík**

FRÍTÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Leirvík er við at gerast ein ein vinnubygd burturav. Frá Interkommunalu Brennistøðini í eyst til Statoilstøðina í vest finnur tú ímillum Faroe Marine Product, betri kent sum høvdavirkið, Tavuna, reiðaravirkið hjá Justinussen, reiðaravirkið og virkið hjá Kjartan Joensen, umframt egningarskúrar. Eisini er eitt elvirki í bygdini, sum hevur fleiri fólk í arbeiði.

So hvat er meiri náttúrligt í einum so vinnuríkum øki enn at hava eitt sindur til sinnið og búkin? Og tí syrgir Bowlinghøllin í Leirvík fyri.

Føroyar gerast alt meiri altjóða merktar. Rákið úr USA fyrst og fremst, men eisini úr øðrum pørtum av heiminum, kemur inn á okkum umvegis serliga Danmark. Tað sæst aftur allastaðni. Vit kunnu til dømis nevna kaffibarrir, fitnessmiðstøðir, Burger King, Sunset Boulevard, sushi matstøð – og bowlinghøllir.

Eftir at bowlinghøllin í Havn – Want2bowl – læt dyrnar upp, eru komnar nýggjar til, bæði í Suðuroy og Leirvík. Og tann, sum tíðliga sá hendan møguleikan, var Ólavur Olsen í Leirvík.

- Eg metti, at tað var fólkagrundarlag fyri einari bowlinghøll, eftir at Norðoyatunnilin læt upp, og tí tók eg avgerð um at byggja høllina, sigur Ólavur Olsen, sum í fleiri ár hevur átt og rikið Statoilstøðina í Leirvík.

Ólavur Olsen hevur í nøkur ár eisini havt eitt byggifelag, so hann hevur sjálvur gjørt ein stóran part av arbeiðinum við at byggja bowlinghøllina. Hon varð so alment tikin í nýtslu 28. oktober 2005.

## Væl vitjað

Hesi góðu trý árini hevur hann rikið bowlinghøllina saman við Statoilstøðini, og fyri tveimum árum keypti hann so ein handil í bygdini og rak hann undir samtakinum Samkeyp.

- Men tað drenaði so nógva orku, at tað gjørdist ov nógv, og nú hava vit so selt handilin aftur, sigur Ólavur Olsen.

Stutteftir, at bowlinghøllin varð tikin í nýtslu gjørdist hann varðugur við ein tørv á at fólk eisini kundu fáa ein góðan bita eftir eitt bowlingkvøld, og hóast tað bar til at fáa grillmat á Statoilstøðini, ið liggur bara nøkur fá fet frá bowlinghøllini, so var hetta ikki »ideella kombinatiónin«.

Hann tók tí avgerð um at byggja uppí bowlinghøllina, so rúm gjørdist fyri einari matstovu og einum stórum og framkomnum køki.

- Arbeiðið byrjaði í fjør vár. Vit gjørdu tað mesta sjálvir, og um miðan november var so klárt at taka nýggju matstovuna í brúk, sigur Ólavur Olsen.

Hann sigur, at bowlinghøllin frá byrjan av hevur verið væl vitjað. Fólkagrundarlagið er Norðoyggjar og Eysturoyggin, men tað hendir seg meiri enn so, at tað koma fólk aðrastaðni frá, eisini úr høvusstaðnum.

- Gerandiskvøld er einki trýst á, men um vikuskiftið er høllin væl vitjað. Fríggjakvøld og leygarkvøld er vanliga nógv fólk, og tá hava vit eisini opið til klokkan eitt um náttina, sigur Ólavur Olsen.

## Matur hvønn dag

Dagligur leiðari av bowlinghøllini – og nú eisini matstovuni – er Berg Vatnhamar. Hann arbeiddi annars »í eitt mannaminni« hjá Leif Mohr í Havn, men eftir at hava verið í farloyvi eina tíð er hann nú burtur av leiðari av Bowlinghøllini í Leirvík.

- Matstovan stóð liðug